# Minningarorð um Siri Davidsen

**★ 18. juli 1979 ✞ 3. august 2006**



Best sum sólin kagaði fram, og alt rundan um okkum angaði av blómum, fingu vit tey tungu boð um at tú góða Siri ikki var ímillum okkum meira.

Alt steðgaði upp, ein blóma var følna. Líka so bjart sum sólin skein hendan dagin, líka so nógv skein tú ímillum okkum. Tú vart ein sólstrála, altíð við tí góða, tú hevði so nógva umsorgan fyri øllum, ikki minst børnunum, tú tók tey til tín, sum um tey vóru tíni egnu. Vit eru takksom fyri, at vit fingu loyvi at hava teg her í útibarnagarðinum í Miðvági í tvey ár, tvey góð ár, har tú vísti okkum við tínum góða sinni og spaklindi, at tað ikki altíð er neyðugt við stórum orðum, tú gleddist altíð yvir alt tað góða, ongantíð eitt ringt orð um nakran.

Tú segði altíð, hvussu gott tú hevði tað her hjá okkum í Miðvági, og tá nýggi barnagarðurin í Sørvági søkti eftir fólki, vóru vit bangin fyri at missa teg til Sørvágs, men tú segði: "eg kann ikki fara frá mínum børnum, eg eri so góð við tey". Nú ert tú ikki ímillum okkum meira góða Siri, saknurin er stórur, men vit koma ongantíð at gloyma teg, men altíð at goyma teg í okkara hjørtum.

Tankarnir leita heim til foreldur og syskin, sum Siri var so góð við, tit hava mist tað dýrabarasta tit áttu, má Harrin styrkja tykkum í sorg tykkara, sum versið so gott sigur tað: Frið lati Eg tykkum eftir, frið Mín gevi Eg tykkum. Hjarta tykkara óttist ikki og missi ikki mótið. Johs. 14:27.

Eitt av børninum segði tað so gott , at vit sluppu at læna Siri, og tá Jesus pápi skuldi hava ein at ansa eftir øllum børninum í himlinum, so var tað gott at hann valdi Siri, tí so hava børnini tað gott.

Takk fyri góð minnir góða Siri.

**Starvsfelagar**
**í Útibarnagarðinum í Miðvági**

---

# Bræv til Siri

**Góða fitta Siri!**



Nú tú ikki kemur aftur í barnagarð, tí tú ert blivin ein eingil hjá Jesuspápa, vilja vit á Títlingastovuni, takka fyri alt tú hevur verið fyri okkum.

Minnist tú, tá vit plagdu at klandrast um hvør slapp í tín bil, til Trøllakambasand ella til Vatnsoyrar. Tá vit sníttu, og tú gav okkum bomm.

Tá vit plagdu at sita og tekna hestar, hundar, perla og Tara kom at vitja í ljósareyðari troyggju.

Tú segði ongantíð nej, tá øll hini søgdu nej. Minnist tú hvussu stuttligt tað var, tá vit plagdu at fanga krabbar og gera okkum vát.

Góða Siri-mamma, sum vit plagdu at kalla teg, tú var so pen sum ein sól, og tú føldi, sum um vit vóru tíni børn. Vit vilja minnast teg, hvussu góð tú vart við okkum, og allan tann kærleika tú gavst okkum, og goyma tað í hjartanum.

**Heilsan Títtlingarnir**

# Andlát og jarðarferðir

**Kjartan Sofus Nielsen, Saltangará**, andaðist í heiminum mikumorgunin 23. august, 79 ára gamal. Farið verður úr heiminum í Glyvra kirkju, í dag kl. 18. Jarðarferðin verður úr Glyvra kirkju leygardagin kl. 14. Tey, ið ynskja at minnast Kjartan, kunnu lata eina peningagávur til Glyvra kirkju. Konta í peningastovninum.

**Bodil Davidsen av Sandi**, ættað úr Fredrikshåb, andaðist í heiminum týskvøldið, 68 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Karl Monrad Joensen, Klaksvík**, andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, hósmorgunin 24. august, 76 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni

Jarðarferðin hjá **Hans Jørgen Jensen, tannlækna í Hvalvík**, verður úr Hvalvíkar kirkju, leygardagin kl. 14.




# Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá høgt elskaða kona, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Diana Hansen**

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til heimasjúkrasystrar og heimahjálparar.
Tøkk fyri umlættingardagar á røktarheiminum og dagarnar á sjúkrahúsinum.
Tøkk til tykkum, sum komu inn á gólvið og tykkum, sum ringdu.
Eisini ein tøkk til tykkum, sum góvu og hjálptu til við ervinum.
Tøkk fyri troystarrík orð í kapellinum, í Betesda og á grøvini.
Tøkk til øll tykkum, ið fylgdu henni til hennara síðsta hvíldarstað á fold.
Tøkk fyri gávur til Zarepta.
Harrin signi tykkum øll.

*Familjunna vegna*
**Esmar, Anna, Malena, Ólav Jákup og Jógvan Kári við familjum**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum sýndu samkenslu, tá ið okkara elskaði sonur og beiggi

**Rókur Sunason Fjallsbak**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til prest og sangarar.
Ein serlig tøkk til føðideildina, læknar, sjúkrasystrar og jarðamøður.
Takk fyri blómur og kransar.
Takk fyri hjálp til ervið.
Stóra tøkk til tykkum, ið fylgdu Róki til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna tey avvarðandi*
**Teresa, Suni og Heiðrun**

# Tøkk



Hjartaliga takki eg øllum, sum mintust meg á 100 ára degnum 9. august 2006.

Ein serlig tøkk til leiðslu og starvsfólk á Ellisheiminum.

**Vinarliga**
**Jóhanna Mathea Skaale**

Lesið Sosialin -so eru tit við!